## DAGSINS MEINING

# Vælkomið Ísrael

Mikukvøldið spældu Føroyar sín næstseinasta dyst í HM undankappingini. Hann var ímóti Ísrael. Og tað verður so aftur Ísrael á skránni, tá vit leika seinasta dystin í hesi kappingini í oktober. Og tá verður spælt í Ísrael. Lat okkum allarfyrst bjóða ísraelska liðnum og fylgisneytum vælkomnum til Føroya at spæla fótbólt, men eisini til at hitta føroyingar og síggja vøkru náttúru okkara. Tað er ikki hvønn dag, at vit hava so forvitnisliga vitjan úr tí landinum, sum so mangir føroyingar meta so høgt. Væl vitandi, at tað eisini eru føroyingar, sum ikki eru so fegnir um alt, sum Ísrael fyritekur sær, so eiga vit at lata hesi viðurskifti hvíla hesar dagarnar ísraelska landsliðið vitjar. Vónandi fáa tit nakrar góðar dagar í lítla landi okkara.

Hóast fjarskotin – vit í Norðuratlantshavi og tit í Miðeystri – so hava vit nógv í felag, eitt nú átrúnaðarligu røturnar. At nógvir føroyingar kenna seg drignar at Ísrael og fólki tess er ein sannroynd. Á hvørjum ári leita hundraðtals føroyingar til hetta søguliga landið at vitja og at uppliva – síggja og hoyra um kristindómsins vøggu. Tað má tí eisini vera áhugavert fyri ísraelar at uppliva eitt land, har fólkið sær so nógv upp til og kennir seg so nógv knýtt at søguni hjá tí landi og øki, har kristindómurin og harvið okkara trúðarlív og –fatan hava sín uppruna.

Oftani verður orðið ambassadørar fyri land sítt nýtt, tá fótbóltslandslið fara úti í heim at spæla. Og eins og vit eru errin av okkara liði og meta spælararnar sum góðar ambassadørar fyri okkara land, mugu vit rokna við, at ísraelar meta sítt landslið sum góðar ambassadørar fyri sítt land. Tit skulu tí verða væl móttiknir her eins og vit vóna, at okkara menn fara at fáa eina eins góða móttøku, tá vit í oktober fara til Ísraels at spæla.

Við slíkum landsdystum kundi eisini so mangt annað fylgt við. Um hugflog, dirvi og vilji var til tess. Umframt at menna ítróttarligu samvinnuna, so eiga slíkir dystir eisini at kunna rúma øðrum "brúgvabyggjaríum", eitt nú á mentanarliga og vinnuliga/handilsliga økinum. Kundi tað ikki verið eitt hugskot í framtíðini at nýtt hesi landsdystarhøvi til nettupp at ment samvinnu á øðrum økjum. At tað slíkar dystir eisini vórðu umboð fyri mentan og vinnu/handil, tí tá tað longu er fokus á tvey lond, har vit eru tað eina, átti at borið til at bygt nýggjar brýr.

Tað er greitt, at steðgurin til slíkar dystir er ikki drúgvur. Men til ber at tilrættaleggja hetta væl, tí vit vita í góðari tíð frammanundan, hvat tað eru fyri lond, sum vit koma at spæla móti, og harvið eisini hvørji lond vit fáa vitjan av. Hví ikki tá brúka hesa tíðina at umrøða og finnauppá, hvussu vit kundu ment samvinnuna við tey londini vit í framtíðini fara at spæla móti. Her liggur heilt vist eitt potentiali, sum vit áttu at givið gætur. Og hvat við at sett hol a longu nú og tikið okkurt stig á hesi leið, tá vit fara til Ísrael at spæla í næstum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Forera okkara milliónir burtur

**Petur Magnussen**
*pensionistur*
*Sandavági*



Føroyskir politikarar geva vinum og kenningum fólksins ognir sum persónligar gávur. Og talan er um milliónir av krónum. Tá so fáast skal inn aftur í landskassan, verður rokningin send pensionistum og barnafamiljum.

Undan hvørjum vali standa hesi politikarar og rópa upp um, at fiskurin, sum svimur á grunnum okkara, er fólksins ogn. Allir føroyigar eiga hann.

Men hesir somu politikarar eru skjótir at lata hann fara til ávísar útvaldar kenningar, sum fáa hesa fólksins ogn stungnað niður í sínar privatu lummar at gera við, akkurát sum teir vilja. Og politikararnir skammast ikki.

Teir skammast heldur ikki við at leggjast á kroppin á pensionistum og barnafamiljum at pína hesi við avgjøldum á bæði líkt og ólíkt, tá pengar mangla í.

Heldur skuldi tað verið soleiðis, at tá fiskiloyvi vórðu latin, skuldu tey verið latin skipinum heldur enn persóninum. Og tá skipið varð selt, skuldi loyvi farið aftur í ein fiskidagabanka.

Men fyri at fáa hesar krónurnar, sum mangla í hjá politikarunum, áttu tey skipini, sum fáa fiskiloyvini, eisini at fingið álagt eitt avgjald av søluni. Kanska eitt prosent ella so. Har eru pengar at tjena. Nógvar milliónir at fylla í ymsu holini, sum altíð eru.

# Gransking uttan eftirlit

**Páll Poulsen**



Í øllum heiminum verður granskað. Sagt verður, at vitan er vald. Í anglo-saksiska heiminum eru eftirlitisskipanir, sum beinleiðis testa støðið. Ein Ph. D í USA merkir í veruleikanum at persónurin hevur tann førleikan, sum stendur í próvskjølunum.

Hesir persónar hava verið ígjøgnum eina sanna eftirlitis hvirlu, sum eisini er trygdin fyri at tað sum stendur í pappírunum passar.

Nivelleringin í donsku skúlaskipanini byrjaði longu í sekstiárunum og hevur drigið føroyingar niður síðani tíðliga í áttatiárunum. Man bygdi bara skúlar uttan eftirlit.

Fyri at koma burturúr hesi hundaøði royndu danir seg við at tekkjast anglikansku Ph. D. skipanini, samstundis sum nivelleringin helt áfram.

Á Fróðskaparsetrinum eru "Drekkivanar fyrr og nú" 1994, "Fylking" 1997, "Hin føroyski Róðrarbáturin" 2001 og "Lossingarmenn í Havn" 2003, málandi dømi um eina almenna investering í nivellering, sum ongan enda tykist at hava. T.e. tann sosiala skipanin stemplar seg sjálva sum vísindaliga.

At Ph. D. lesandi í Føroyum eru 25 ár eldri enn tey í Bretlandi og USA kemur av at skipanin ikki riggar. Hesi fólk hoyra heldur ikki heima í einari skúlaskipan, um hendan skal takast í álvara.

Trupulleikin er enn einaferð integritetur. Tann sjálvsútnevndi "granskarin" dugir ikki at skilja ímillum eitt sosialt lív og tað at granska.

Tískil fáa vit hesar merkiligu konstellatiónirnar har vaksnir menn standa og lova Niels Finsen uppí teirra sosiala klubba. Teir standa og samanlíkna seg sjálvar við eitt heimsmenni, tí teir ikki klára at flyta seg sjálvar frá tí sosiala støðinum.

Tá ið atgongdin til almennar kassar, via vinir og kenningar og Jóannes Dalsgaard er óendalig, so sigur tað seg sjálvt, at teir eru úti at koyra.

Maktin er vitstolin og gongur í blindi og trýstir á "rename" knøttin. Aha, "Universitetshospital". Hví ikki "Universitets-pylsuvogn". Ella Universitetsskipasmiðju, halda tit at Poul Mohr hevði latið tykkum 90 milliónir uttan úrslit?

Bert eitt er víst í hesum høpi, tað er at eingi úrslit fara at spyrjast burturúr, tað hevur Jóannes Dalsgaard longu syrgt fyri.

Sannleikin er sum kunnugt sosialt treytaður, men máti skal vera við.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.